# Vælkomin

í Sjóvar kommunu

Kunningarrit 2019



## Í Sjóvar kommunu eru 5 bygdir:


Innan Glyvur


Strendur


Kolbeinagjógv


Morskanes


Selatrað

## Kommunustýrið: 1/1-17


Artur Johansen

*Borgarstjóri*

*Tlf. 23 27 27*


Pole J. Hansen


Jákup Berthelsen


Anfinn Gærdum


Súni F. Olsen


Lisa Frederiksberg


Steingrím Jacobsen

---

## Umsiting:

Anna E. Joensen
*Skrivari*
*Tlf. 23 27 29*

Julia Kass
*Fíggjarleiðari*
*Tlf. 23 27 28*

Tummas Johannesen
*Tekniskur leiðari*
*Tlf. 23 27 20*

Bárður Danielsen
*Trivnaðar/skrivstovufólk*
*Tlf. 23 27 25*

---

### *Fíggjarnevnd:*

Artur Johansen, formaður

### *Tekniska nevnd:*

Lisa Frederiksberg, formaður

### *Trivnaðarnevnd:*

Pole J. Hansen, formaður

### *Vinnunevnd:*

Jákup Berthelsen, formaður

*Góði borgari:*

Sjóvar kommuna bjóðar tær hjartaliga vælkomin.
Í Sjóvar kommunu er tilboðini nógv - bæði til børnini, tey ungu, tey tilkomnu og til tey, ið eru komin til árs.

**Kommunuskrivstovan** er avgreiðslan hjá Sjóvar kommunu.
Hevur tú ein fyrispurning til kommununa, ert tú altíð vælkomin inn á gólvið, ella ringja tlf. 47 27 27.

## Kunning til borgaran

Sjóvar kommuna leggur stóran dent á kunning og opinleika. Vit hava eina virkna heimasíðu, har kunnað verður um tænastur og tíðindi úr kommununi. Borgarin er eisini vælkomin at lýsa tiltøk, sum eru í kommununi, á heimasíðuni.

Kunningin verður eisini løgd á okkara Facebook vanga - Sjóvar kommuna.

## Fólkatal og skattur

1. januar 2019 búðu 1064 fólk í Sjóvar kommunu, 883 á Strondum, 75 Innan Glyvur, 34 í Kolbeinagjógv, 32 á Morskranesi og 40 fólk á Selatrað.

Tað ganga umleið 130 næmingar í Stranda skúla og umleið 110 børn verða ansaði á dagstovninum Lítlafløtti.




Skattaprosentið er í løtuni 21. Barnafrádrátturin er kr. 7.000.

## Flyting til Sjóvar kommunu

Úr einum Norðurlandi: Flytingarskjal skal útfyllast á kommunuskrivstovuni. Neyðugt er at upplýsa norðurlendska p-talið.

Úr einum øðrum landi enn Norðurlandi: Flytingarskjal skal útfyllast á kommunuskrivstovuni. Neyðugt er at hava uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi.



## Barnaansing

Kommunan bjóðar ansing av børnum upp til og við 2. flokk. Sjóvar kommuna hevur vøggustovu, barnagarð og frítíðarstovu. Umsóknarbløð til dagstovnin eru at finna á heimasíðuni hjá stovninum, www.litliflottur.fo

## Skúlabólkur

Skúlabólkur er á Lítlafløtti, har starvast tveir námsfrøðingar og ein lærari. Børnini eru í skúlabólki týsdag - fríggjadag kl. 10-12.30.

## Frítíðarstova

Øll børn, sum fara í 1. ella 2. flokk í Stranda skúla, fáa tilboð um frítíðarstovu.
Eftir loknan skúladag verða børnini fylgd til frítíðarstovuna.

## Stranda skúli

Vit hava í dag sera góðar karmar á skúlaøkinum. Elsti parturin av skúlanum er frá 1969, síðani bleiv útbygt í 1984 og nýggjasta uppíbyggingin er frá 2011. Í skúlanum ganga næmingar úr 1. – 10. flokk.

**eNám** er eitt samstarv millum Stranda skúla, Skúlan við Streymin og Fuglafjarðar skúla um 10. flokk.

Innskriving í fyrsta flokk fer fram seinnu helvt av januar mánaði. Lýst verður í fjølmiðlunum og heimasíðuni hjá kommununi.

Skúlin hevur egna heimasíðu: www.strandaskuli.fo.

## Barnaverndartænastan

Skal tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð. Sjóvar kommuna er við í Eysturoyar barnaverndartænastu.

Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes-, Sjóvar- og Runavíkar kommunur.
Tlf. nr. 41 70 90 svarar millum kl. 9:00 og 15:00 gerandisdagar. Vakttelefonin, nr. 23 70 90, svarar eftir kl. 15:00 og í vikuskiftinum.

## Barnatannrøkt

Sjóvar kommuna samstarvar við Runavíkar kommunu um Barnatannrøktina á Skála. Øll børn í Sjóvar kommunu fáa ókeypis tannrøkt til tey fylla 18 ár. Barnatannrøktin á Skála hevur tlf. 441272

## Eldrarøkt

Kommunan er partur av eldrasamstarvinum **Roðin**, tlf. 47 82 00 t-post rodin@rodin.fo. Eldrasambýli **Sjóvarlon** á Strondum er ogn hjá hesum samstarvi.




**Dagtilhaldið,** sum er í pensionistahúsinum, er opið týsdag og hósdag kl. 14. Pensionistafelagið tekur sær av dagtilhaldinum.

Kvøldskúlaskipanin hevur fleiri tilboð til eldri t.d.:

**Venjing í maskinum** á heilsumiðstøðini, vegleidd av fysioterapeuti.

**Eldrasvimjing og fimleik.**



**Undirhúsið:** Er opið mánadag, mikudag og leygardag kl. 15-17.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bókasavn:** Í skúlanum er bókasavn við breiðum úrvali av bókum, og er útgjørt eftir nútíðar tørvi. Bæði næmingar og almenningurin hevur atgongd til at nýta bókasavnið ávísar tíðir. Stranda bókasavn er eisini tøkt á internetinum. Til ber at síggja hvørja bøkur savnið hevur, og um tær eru tøkar. Heimasíðan eitur http://fao.elibdrift.dk/fao-strendur. Bókasavnið er opið mánadag kl. 18-20 og mikudag kl. 19-21.

**Svimjihylur:** Svimjihylur er í skúlanum. Almenn svimjing er **mánadag** kl. 17- 18 dreingir, kl. 18 - 19 gentur, kl. 19 - 21 vaksin, **mikudag** er familjusvimjing: kl. 16 - 17 pinkubørn upp til 5 ár, kl. 17-18.30 børn undir skúlaaldur, kl. 18.30-20 í skúlaaldri og vaksin kl. 20-21 (hylurin hitaður til 30 stig), og **leygardag** kl. 9-10 vaksin, kl. 10-12 familjusvimjing. Eingin svimjing er tá skúlin hevur feriu.



**Ítróttarhølir:** Í Sjóvar kommunu er bygdahús, sum hevur ein stóran sal, sum m.a. verður brúktur til ymisk bóltspøl, til ber at leiga høli frá kommununi. Ein fimleikarhøll er eisini í skúlanum. Harafturat hevur Strálan eitt venjingarhøli í bygdahúsinum við ymiskum maskinum.

**Uttandura ítróttarøkir:** Við barnagarðin og bygdahúsið er ein graslíkisvøllur, talan er um hálvan góðkendan fótbóltsvøll. Har er eisini spæliplass við rampu, trampolinum og øðrum. Tríggir FIFA-sparkivøllir eru eisini í kommununi, inni í Bø á Strondum, Innan Glyvur og á Selatrað



**Ítróttarfeløg:** Vit hava hondbóltfelagið Stíf, sum hevur lið í flest øllum deildum. Strálan stendur fyri kappróðrinum í kommununi

**Bygdahúsið:** Sjóvar kommuna eigur eitt stórt bygdahús, har er m.a. biografhøli, matarsalur, køkur, høll, brúsurúm. Til ber at leiga bygdahúsið til ymisk tiltøk. Strálan leigar eitt hølið í kjallaranum til ung at savnast í.

**Átrúnaður:** Guðstænasta er hvønn sunnudag í Sjóvar - og Selatraðar kirkju. Á Strondum er sunnudagsskúli í kirkjuhúsinum meðan guðstænastan er. Í missiónshúsinum á Strondum er barnakór, barnaringur, Effatakórið, sjómanskvinnuringur, juniormøtir, ungdómsmøtir, morgundrekka og vanlig møtir annars. Missiónshús er eisini á Selatrað, har verður lýst tá tiltøk eru.

**Skótadepil:** KFUM skótarnir í Føroyum hava ein skótadepil á Selatrað. Har eru javnan legur og ymisk tiltøk, eisini ber til at leiga depilin til ymiskar aktivitetir.

**Fornminnafelag:** Sjóvar Fornminnafelag eigur gamla turkihúsið og handilin í Heygstøð, og tekur ímóti ymiskum fornlutum, sum tey hava í varðveitslu og sýna fram.

**Kvøldskúlin:** Stranda kvøldskúli bjóðar hvønn vetur ymisk skeið, skráin verður lýst í sept/okt.

**Musikkskúlin:** Stranda musikkskúli skipar fyri tónleikaundirvísing í skúlanum.



**Grundstykkir.** Til ber at fara inn á heimasíðuna hjá Sjóvar kommunu og síggja hvørji grundstykkir eru tøk. Harumframt sæst støðd og prísur, eins og myndir eru tiknar á staðnum, so tú sært útsýnið hagani, sí "tøk grundstykkir".

**Vinnuøkir:** Sjóvar kommunu hevur fleiri vinnuøkir á havnaløgunum í kommununi, sí heimasíðu okkara "vinnuviðurskiftir"



**Bátapláss:** Sjóvar kommuna hevur 4 bátahyljar, tríggjar á Strondum og ein á Selatrað. Til ber at leiga sær pláss við bátabrúgvarnar við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Egningarskúrar:** Við bátahylin í Heyggstøð er bygd ein egningarmiðstøð, har eru góðar umstøður at dríva útróður, møguleiki er at leiga seg inn í miðstøðina.

**Bussleið:** Sjóvar kommuna hevur avtalu við privat felag um skúlabarnakoyring. Bussarnir koyra frá Selatrað og Innan Glyvur til Stranda skúla í samband við skúlagongd. Bygdaleiðir tekur sær av almennu bussleiðini til og frá Sjóvar kommunu—*sí ferðaætlan á www.ssl.fo - leið 440 - Skálafjarðarleiðin.*

**Rusk:** Eina ferð um vikuna verða ruskposar heintaðir (í løtuni mikudag), bæði grái og hvíti posin verða heintaðir sama dag. Í mars og september verða rullurnar við ruskposunum bornar í hvørt hús. Tey, sum flyta í nýggj hús, mugu boða kommunuskrivstovuni frá.

**Bingjupláss og endurnýtsla:** Sjóvar kommuna hevur eitt ruskpláss á Hulki á Strondum, sum er opið ávísar tíðir, *sí aðrastaðni í faldaranum*, somuleiðis er ein bingja á økinum til lutir, sum er ætlað Bláa Krossi til endurnýtslu. Á kommunuskrivstovuni eru hølir, har kvinnurnar fyri hjálpararbeiði taka ímóti klæðum til endurnýtslu.

**Gras og greinar** skulu burturbeinast í grótbrotinum vestanfyri Tangan. Grótbrotið er opið somu tíðir sum bingjuplássi.



SJÓVAR KOMMUNA

## Gott at vita:

**Sjóvar kommuna,**

Skúlavegur 10, 490 Strendur

Tlf. 47 27 27, fax 47 27 28

sjk@sjovar.fo

www.sjovar.fo

**Borgarstjórin,** tlf. 23 27 27

**Tekniski leiðarin,** tlf. 23 27 20

**Vatnmeistarin,** tlf. 23 27 23

**Havna/húsavørur,** tlf. 23 27 21

**Gravarin,** tlf. 23 27 26

**Skúlatænarin,** tlf. 23 27 22

**Dagstovnaleiðarin,** tlf. 23 27 47

**Heilsurøktarfrøðingurin,** tlf. 56 23 76

**Heimasjúkrasystrar,** tlf. 79 33 70

**Skúlastjórin,** tlf. 23 27 30

**Skrivstovan** er opin mánadag til fríggjadag kl. 8.30-12.00

**Ruskplássið** er opið: Mánadag, mikudag og hósdag kl. 18-20. Leygardag kl. 14-18.

**Samferðsla,** Leið 440 hevur samband við leið 400, sum koyrir til Havnar og Klaksvíkar.

**Bókasavnið,** er opið mánadag kl. 18-20 og mikudag kl. 19-21.

**Almenn svimjing** er: Mánadag kl. 17-21, mikudag kl. 16 - 21 og leygardag kl. 9-12. Hylurin kann leigast, ring tlf. 23 27 30 ella 27 44 78.
Eingin svimjing tá skúlin hevur feriu.

**Kommunulæknin,** tlf. 47 70 40,
hevur viðtalu á heilsumiðstøðini Strondum
telefonviðtala kl. 8.00-9.00

Bílegg tíð kl. 9.00-11.00 ella á mínlaekni.fo